# Fiskiskip afturvísa samanbering av avreiðingaprísum

**Felagið hjá fiskiskipum og útróðrarbátum, Føroya Ráfiskaseljarafelag, afturvísir ivasama samanbering av fiskaprísum og vísir á at tað vanliga loysir seg at landa í fremmandari havn**

FISKIVINNA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*



*Landing hjá Fiskamarknað Føroya, Toftir*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

Ein søga í fjølmiðlunum um at tað loysir seg ikki at selja fisk uttanlands hevur fingið tað annars so tigandi felagið hjá fiskiskipunum og útróðrarbátunum, Føroya Ráfiskaseljarafelag, at tríva í pennin við skørpum afturvísingum av tilfarinum, sum stavaði frá samskiparanum í Føroya Ráfiskakeyparafelag, Agnar Jensen.

Samstundis sum Ráfiskaseljarafelagið hevur skrivað bræv til Føroya Ráfiskakeyparafelag við rættleiðingum í málinum, sendir felagið út eitt tíðindaskriv har funnist verður at útspælinum frá keyparafelagnum fyrr í vikuni, og har ein røð av týðandi tættum við atliti til hagtøl í tilfarinum verða eftirlýstir.

Á tí veiðandi síðuni av fiskivinnuni undrast fleiri á framferðina hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag sum, uttan at hoyra seg fyri hjá teimum ið varða av fiskiskipunum, almannakunngjørdi eina samanbering av avreiðingarprísum í Føroyum og aðrastaðni.

Tann provokerandi samanberingin hjá keyparafelagnum undir yvirskriftini »Tað lønar seg illa at útflyta heilan fisk« verður soleiðis víst aftur sum skeiv, í og við at grundleggjandi faktorar eru hildnir uttan fyri myndina. Til dømis stendur ikki eitt orð um at ein stórur partur av tí toskinum ið fer av landinum er sokallaður ‘Ryggja toskur’ sum er minni kvalitativur og bíligari enn annar toskur ið verður avreiddur í Føroyum. Tað sama ger seg galdandi við upsa: fiskavirkini í Føroyum vilja ofta ikki taka ímóti upsa tí tey hava ikki ta neyðugu framleiðslu orkuna, og hetta er serliga galdandi fyri tann smáa upsan ið so at siga altíð má av landinum.

### Tjena uttanlands

»Samanberingin hjá Ráfiskakeyparafelagnum sigur tíverri einki um ta sannroynd at tey føroysku virkini eru ikki sinnað at keypa tann tosk ið føroysk skip veiða á Íslandsrygginum,« ljóðar millum annað í tíðindaskrivinum frá seljarafelagnum. »Hvat gerst við hendan tosk?« verður síðani spurt.

»Ei heldur verður sagt eitt orð um at okkara fiskavirkir í veruleikanum hava ongan áhuga í ávísum upsastøddum, hóast hesar væl kunnu umboða stórar partar av veiðuni hjá serliga partrolarunum; og tað sama ger seg galdandi fyri ávísar hýsustøddir. Ein annar táttur sum dettur niður ímillum er tann royndi lutur at tey føroysku fiskavirkini megna ikki yvirhøvur at geva nóg mikið fyri flatfisk og rud.«

Seljarafelagið vísir á at prísgongdin hevur verið ójøvn millum teir ymisku høvuðsbólkarnar av fiskiskipum; at tað hevur gingið afturá við prísunum hjá teimum ið hava landað í Føroyum. Síðani kemur ein hvøss konstatering um lemmatrolararnar, nevniliga at teir tjena betur – og selja uttanlands.

»Um hugt verður at miðal avreiðingarprísum í 2003 í mun til 2002, so er sum heild talan um príslækkingar fyri allar bólkar uttan ein, nevniliga teir lemmatrolarar ið royna á djúpum vatni.«

»Talan er um ein greiðan mun á gongdini í miðal avreiðingarprísum hjá lemmatrolarum og hinum bólkunum av fiskiskipum; tá tosa vit um verulig tøl bygd á avrokningar fyri alt árið.«

»Sum einasti bólkur, hava lemmatrolararnir landað so at siga alla sína veiðu beinleiðis í útlendskari havn.«

Aftan á kritikkin bjóðar seljarafelagið tó keyparafelagnum í breitt samstarv og leggur upp til samskifti um fiskivinnuligar spurningar.

»Eg vil sum formaður í Ráfiskaseljarafelagnum bjóða nevndini í Ráfiskakeyparafelagnum at samskifta við okkum tá talan er um at viðgera hvat sum loysir seg fyri skip og virkir,« skrivar Árni Joensen vegna Føroya Ráfiskaseljarafelag.

»Tað liggur í áhuganum hjá øllum pørtum í fiskivinnuni at royna at fáa mest møguligt burtur úr tí ráværu hetta landið eigur; kunnu vit í felag koma fram til betri hættir og prísir í opnari og erligari kapping, so tænir tað øllum samfelagnum.«

Annars hava Ráfiskaseljarafelagið og Ráfiskakeyparafelagið góðar royndir av sínámillum samstarvi, so sum Kassamiðstøðin. Felags áhugamálini, sum ikki minst liggja í einari heilsugóðari føroyskari fiskivinnu, hava hóast alt eina størri tyngd enn kappingin. Hetta framgongur eisini av einum nýggjum initiativi feløgini hava tikið í samstarvi við Fiskamarknað Føroya við tí fyri eyga at byggja ein altjóða fiskamarknað.

# Vilja tiðna frystar fiskaprísir

**Eru huldumenn ikki vinir við Fiskavirking so eru teir í øðini um at við lóg verða noyddir at bjóða burturvístan fisk fram á uppboðssølu og gjalda dýrt fyri tað áðrenn teir sleppa at útflyta fiskin**

FISKAPRÍSIR
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Fleiri eygleiðarar innan fiskivinnuna vilja vera við, at eitt de facto monopol hjá teimum báðu stóru almennu aktørunum í vinnuni, Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasøla, hevur verið við til at skapa eina óhepna støðu fyri fiskiskip og nógvar smærri fiskaútflytarar.

Uttan mun til um Fiskavirking og Fiskasølan verða mettar sum væl virkandi og væl riknar fyritøkur, so uppliva óheftir fiskaútflytarar so væl sum eigarar av fiskiskipum, at prísmekanisman á Fiskamarknað Føroya er vorðin ógvuliga statisk og ikki longur virkar, sum hon gjørdi fyri nøkrum árum síðani. Orsøkirnar til hetta verða lutvíst adresseraðar til trýstið frá teimum báðum »stóru«, men enn meira til tann tvingsil, sum við lóg noyðir so nógvan fisk um uppboðssøluna.

Trupulleikin er, at eingin torir at leggja kristið navn til og tala Rom ímóti. Men eftirsum nógv av tí vit hoyra vísir seg at ekkóa ymsastaðni í fiskivinnuni, valdu vit á hesum sinni at lata nakrar huldumenn sleppa fram at mikrofonini.

– Fiskamarknaðurin virkaði sera væl tey fyrstu árini, og tá blómaði alt í vinnuni við dynamikki í prísunum og nógvum smáum aktørum, staðfesti ein fiskaútflytari, sum samstundis ræddist fyri at seta seg í óheppið ljós í mun hægri maktir.

– Nú er tað mesta kódnað, og hetta er hent so hvørt sum effektirnar av tí lógarliga tvingslinum hava gjørt seg galdandi; sum er gevur skipanin einans rúmd fyri sera fáum aktørum við størri fíggjarligari orku. Í praksis er ein stór kappingaravlaging farin fram við hjálp av skattgjaldarans pengum.

*framhald á síðu 18*

Bilar
Nr. 19 • hósdagur • 29. januar 2004 • 78. árg.



*Bilskrokk er ein nútímans lakkerings- og upprættingar verkstaður við góðum arbeiðsumstø ðum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Brynleif B. Askildsen:

# Altíð droymt um egnan bilverkstað

*Brynleif B.Askildsen framman fyri Bilskrokk í Slættanesgøtu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




**Vit síggja tey um allan býin, skeltini hjá bilverkstaðnum Bilskrokk í Slættanesgøtu í Havn. Í 1990 stovnaði Brynleif B. Askildsen Bilskrokk, sum er ein serverkstaður fyri upprætting og lakkering**

BILVERKSTAÐUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Um vit hyggja at gongdini tey seinastu 30- 40 árini ber til at staðfesta at av øllum teimum persónum, sum hava lært til bilmekanikara, eru tað sera fáir sum halda fram í hesum starvi. Hvat orsøkin er til tess, eru tað nokk ymiskar meiningar um.

Ein av teimum sum fór í læru sum bilmekanikari við tí fyri eyga at stovna sín egna bilverkstað, er 33 ára gamli havnarmaðurin Brynleif B. Askildsen.

Hann hevur altíð havt stóran áhuga fyri bilum og fór sum 15 ára gamal í læru hjá Bilfríðkan í 1986. Hann bleiv beinanvegin bitin av fakinum og dámdi arbeiði sera væl.

Tað var alla tíðina ein dreymur at fara víðari við egnum bilverkstaði og stutt eftir lokna útbúgving, byrjaði hann sum sjálvstøðugur.



*Starvsfólkini hjá Bilskrokk, f.v. Jógvan Kári í Giljum, lakkerari, Pætur Hentze, verkstaðsleiðari, Suni Johannesen, plátusmiður, Brynleif Askildsen, stjóri, og Høgni Sigurðsson, plátusmiður. Árni Silvurstein vantar á myndini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Byrjaði í garaguni

Bilskrokk var stovnað í 1990 har Brynleif sjálvur er stjóri og eigari. Byrjað var í eini garagu í Leivsgøtu við smærri skaðum, eftir fáum árum mentist virksemi á bilverkstaðnum, og tørvur var á størri plássi.

Í november 2002 var flutt inn í størri og rúmligari bygning í Slættanesgøtu 9 har Bilskrokk nú heldur til. Bygningurin hevur stór høli við sproytikabinu og betri møguleikar at hjálpa viðskiftafólki við bilskaðum sum t.d. lakkering, tryggingarskaðum, buglum, rusti og mongum øðrum.

Stórir sum smáir skaðar verða afturgjørdir. Er talan um størri skaðar og bilurin t.d. er vorðin skeivur, verður upprættingarbonkurin brúktur. Í løtuni starvast 6 fólk hjá Bilskrokk.

## Peugeot víðkar í Kina



Peugeot og kinesiski samstarvsfelagin Dongfeng víðka framleiðsluna í Kina og hava gjørt ein íløgu uppá 600 milliónir evrur í kinesiska marknaðin. Fyrsta kvartal í ár kemur fyrsti kinesiskt framleiddi Peugeot á kinesiska marknaðin. Bilurin verður gjørdur við støði í Peugeot 307

*Kelda: Motor Magasinet*

## RAV4 facelift



Toyota RAV4 árgang 2004 er komin í eini nýggjari dagførdari útgávu við t.d. nýggjum forlyktum og kølaragittari, eins og bilurin er smartari innan. RAV4 er tann best umtókti SUV í Evropa

*Kelda: Motor Magasinet*

## Sótfiltur til dieselbilar



Týsku myndugleikarnir vilja nú hava at allir dieselbilar, eisini lastbilar, skulu hava sótfiltur, og tað skal helst verða langt áðrenn EuroV umhvørvisreglurnar koma í gildi í 2010

*Kelda: Motor Magasinet*